gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Skommin í Kalsoynni

### *Oddagrein*

LIÐIN eru nú 20 ár síðani, at bergholini í Kalsoynni vórðu sprongd ígjøgnum til Mikladals - og nøkur ár seinni til Trøllanes. Tað var mikið framstig - eitt framstig, sum uttan iva fyri ein stóran part er orsøk til, at fólk støðast á oynni, sum við hesum varð flutt langt fram í tíðina.

NÓGV hava skírt hetta eitt ørvitisprojekt - og líkasum brúkt hetta sum eitt symbol upp á øru áttatiárini. Men hesin kritikkurin er als ikki rættvísur - og mest átøkur illa undirbygda kritikkinum úr Danmark um føroyska samferðslukervið, sum skal hava koyrt føroyska samfelagið á búskaparligu eggina.

HETTA er als ikki rætt. Íløgurnar í samferðslukervið hava verið skilagóðar - hóast vit altíð kunnu keglast um raðfestingar. Men vit kunnu ikki annað enn geva varatingmanninum úr Norðoyggjum, Mamy Dal Sørensen rætt, tá hon í fyrispurningi til samferðsluráðharran vísir á, hvussu illa frágingið tað er hjá landsins myndugleikum, at samferðslunetið í Kalsoynni ongantíð er gjørt liðugt.

EINGIN av teimum fýra tunnlunum er gjørdur liðugur. Eitt er, at allir eru myrkir - at ljós ikki er lagt í dag. Men harafturat er koyribreytin sera vánalig, og ongar avmerkingar við rípum ella endurskinum eru at síggja. Ert tú ferðandi til gongu, á súkklu ella prutli, er stórur vandi á ferð, um bilur er í tunnlunum, ið bert hava eina koyribreyt. Tá mátti ikki verið tað stóra hóvastákið at gjørt tunnlarnar lidnar og at lagt ljós í teir, so fólkið í oynni eykkaleyst kundi ferðast millum bygdirnar undir tryggum umstøðum.

VIT mugu ikki gloyma, at vit búgva í einum oyggja- og fjallalandi. Skulu vit varðveita búsetingarmynstrið, so mugu íløgur gerast í samferðslunetið. Soleiðis hevur politiski viljin eisini altíð verið, men tað er illa avstaðfarið, tá kostnaðarmiklar og neyðugar íløgur ikki verða gjørdar lidnar. Tá hava tær ikki tað virði, tær áttu at havt.

UTTAN at taka nakað frá nýggja landsstýrismanninum í samferðslumálum, so er hann tiltikin fyri at verja miðstaðarøkið. Vit skulu kortini á hesum stað mæla honum til at viðgera hetta málið við vælvild. Hann kann, við einum lítilum innsatsi vísa, at hann er samferðsluráðharri fyri allar føroyingar. Hann hevur longu nevnt Gásadalsbergholið…

MEN kann hann greiða kalsoyingum henda trupulleika, hevur hann heraklapp uppiborið.

***Sosialurin***

# Sólríkasta summarið í 52 ár

*Føroyska summarið í ár var tað sólríkasta summarið í øllum hagtalssavninum hjá veðurstøðini*

JOHN JOHANNESSEN

Í maj, juni og juli skein sólin í ár 175 tímar meira, enn eitt vanligt føroyskt summar.

Mátingar hjá veðurstøðini í Havn vísa, at sóltímarnir hesar tríggjar mánaðirnar í ár vóru heilir 535.

Hagtølini hjá veðurstøðini um sóltímar ganga aftur til 1949, og í hesum tíðarskeiðnum, skulu vit heilt aftur til 1977 fyri at finna tað næst sólríkasta summarið. Tá skein sólin í 458 tímar. Hetta eru kortini 77 sóltímar færri, enn sóltímarnir í ár.

Í 1981 vóru sóltímarnir einans 227, og var hetta sólfátækasta árið síðani 1949. Hetta árið taldu sóltímarnir minni enn helvtina av teimum í ár.

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, sigur orsøkina til góða summarið í ár vera tilvildarliga. Vit hava bert verið so heppin, at allur hátrýststreymurin er farin yvir Føroyum hetta summarið, sigur hann.

Í Danmark hevur veðrið verið óvanliga vánaligt í summar. Orsøkin til hetta er, at nógvir lágtrýststreymar eru farnir yvir Danmark í summar.



*Mai, juni og juli í ár høvdu heilar 177 fleiri sóltímar enn eitt vanligt føroyskt summar*

# Vesturkirkjan 25 ár í dag



JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Í dag eru 25 ár ligin síðan Vesturkirkjan varð vígd og hetta fer ikki heilt stillisliga aftur við borðinum. Sunnudagin verður hátíðargudstænasta, til minnis um vígsludagin. Allir tríggir gudstænararnir, sum fara at hava orðið hendan dagin eita Joensen til eftirnavn.

- Hans Jacob Joensen, biskupur fer at prædika og sjálvur fari eg at prædika yvir dagsins tekst. Bergur D. Joensen, prestur, fer at enda gudstænastuna, sigur Heri Joensen, høvuðsprestur í Vesturkirkjuni.

Organistarnir fara at skiftast um at spæla, og kór fer at syngja. Heri roknar við at kirkjan verður full hendan dagin og tað merkir at eini 800 fólk fara í kirkju.







Kaupthing letur nú dyrnar upp til alheims virðisbrævamarknaðir. Við hollum royndum og vælútbúnum starvsfólki er Kaupthing ein kappingarførur íløgubanki á altjóða stigi. Tosa við okkum og vit finna í felag eina loysn, ið hóskar til júst tín tørv.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com